Jólahugni



# Elin Heinesen

*Hvussu fert tú at halda jól í ár?*
Saman við pápa mínum, systir mínari og familju hennara heima hjá henni.

*Hvat etir tú til døgurða á jólum?*
Antin gás ella dunnu - og so fleskasteik við 'sprødum' svøri.

*Hvat er tað besta við jólum?*
At kunna hugna sær og gleðast saman við familjuni. At jólini skapa ljós og hugna í eini annars myrkari og ótespiligari tíð.

*Hvat er minni gott við jólum?*
At fólk ofta forvænta sær ov nógv og leggja ov nógv fyri, so tey gerast stressað - og fátøk - av tí. Meiningin er jú, at vit skulu slappa av og hugna okkum saman. Ikki hava ringa samvitsku um ikki at gera alt nóg gott.

*Hevur tú nakrantíð hildið jól uttanlands?*
Ja. Eg búgvi jú uttanlands... men nei kortini - eg havi faktiskt ongantíð ferðast fyri at halda jól aðrastaðni enn heima. Eg havi altíð verið antin heima hjá mær sjálvum í Danmark ella heima hjá foreldrunum í Føroyum á jólum. Havi tó hildið jól í Spania, tá vit búðu har eitt ár, tá eg var 10 ára gomul.

*Hvønn jólatónleik dámar tær best?*
Stillisligan jólatónleik og jólasálmar - og tá børn syngja jólaløg. Tað er so fitt.

*Hvat ynskir tú tær í jólagávu?*
Gávukort til klædnabúðir.




















